## Níggju ára gamal hongdi seg eftir lagnu Saddams

Ein 9 ára gamal pakistanskur drongur, Mubashar Ali, hevur hongt seg, eftir at hann hevði sæð í sjónvarpi, hvussu Saddan Hussain varð tikin av døgum

At sumt, sum sent verður í sjónvarpi, kann hava negativar fylgjur og fáa álvarsligar avleiðingar, munnu mong dømi vera um.

Dagbladet .no skrivar um ein 9 ára gamlan pakistanskan drong, sum hevur hongt seg eftir at hava sæð í sjónvarpi, hvussu fyrrverandi irakski einaræðisharrin varð tikin av døgum.

Tann 9 ára gamli doyði, tá ið hann royndi at eftirgera tað, sum hann hevði sæð í sjónvarpinum.

Tað var 10 ára gamla systirin hjá Mubashar Ali, sum hjálpti tí 9 ára gamla at binda eitt reip í takrennuna í húsunum, tey búðu í.

Tað sigur løgreglan í Pakistan.

Hini í familjuni hildu, at børnini spældu og høvdu ongan varhuga av tí, sum systkini vóru í ferð við at gera.

– Kona mín og eg lupu til fyri at bjarga Mubashar Atli, tá ið systirin rópti um hjálp, men sonurin doyði, sum avleiðing av myndunum, hann hevði sæð í sjónvarpi, sigur pápin, Alamgir Paracha.



# Toskaprísurin í Noregi fellir

**Eftir at prísurin á toski hevur verið ómetaliga góður í heyst, er nú líkt til, at prísirnir fara at fella nakað aftur - og norðmenn hava longu staðfest, at fall hevur verið í prísunum undan jólum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Noreg hevur í ár útflutt umleið 14.482 tons av feskum toski, og miðalprísurin fyri árið liggur um slakar 30 krónur fyri kilo. Um somu tíð í 2005 útflutti Noreg tilsamans 17.950 tons fyri ein miðalprís upp á 26,24 krónur fyri kilo.

Prísurin á toski hevur verið ógvuliga góður í heyst, men um miðjan desember byrjaði prísurin at lækka og endaði ta einu vikuna niðri á 33 krónum fyri kilo til ES.

Í fyrra helmingi av desember var prísurin á feskum norskum toski til útflutnings nevniliga út við 40 krónur fyri kilo.

Í 2006 útflutti Noreg tilsamans 17.738 tons av frystum toski fyri ein miðalprís, sum var 23,03 krónur fyri kilo. Í 2005 var miðalprísurin hinvegin 20,13 krónur fyri kilo, og tá var samlaða nøgdin fyri árið 18.745 tons, skrivar Fiskaren.

# 67 ára gomul føddi tvíburðar

Spanska kvinnan, sum sambært sjúkrahúskeldum í Barcelona hevur føtt tvíburðar, er eitt ár eldri enn rumenska kvinnan, Adriana Iliescu, sum gjørdist mamma í januar mánaða í 2005.

Navnið á 67 ára gomlu kvinnuni er ikki almannakunngjørt enn, men sambært sjúkrahúskeldum í spanska býnum, Barcelona, hevur kvinnan júst føtt tvíburðar á Sant Pau sjúkrahúsinum í býnum.

Sambært BBC er spanska kvinnan eisini heimsins elsta, sum hevur føtt børn - og eitt ár eldri enn rumenska kvinnan, sum føddi fyri tveimum árum síðan.

NTB sigur, at spanska kvinnan gjørdist við barn eftir viðgerð í Latín-Ameriku.

Tvíburðarnir eru fyrstu børnini hjá kvinnuni, og sambært talsmanninum hjá Sant Pau sjúkrahúsinum hava bæði móðir og børn tað gott.

CNN veit at siga, at kvinnan, sum er úr Andalucia í Suður-Spaniu, valdi sjúkrahúsið í Barcelona, tí tey har eru væl fyri at taka sær av føðingum, sum kunnu hava trupulleikar við sær.

**(-vilmund)**

Landssfundur Føroya Fiskimannafelags:

# Atfinningar – men sum heild undirtøka um virksemið FF's

**Felagsformaðurin, Óli Jacobsen, sigur, at atfinningar vóru í einstøkum málum, men sum heild heldur hann, at fiskimenn á landsfundinum tóku undir við førda politikkinum hjá felagnum. - Tey mál, sum vóru frammi, verður arbeitt við, og tað kom einki fram um, at felagið hevur arbeitt við málum, sum ikki skuldu verið tikin upp, sigur hann**

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sum vanligt hevur verið í nógv ár, helt Fiskimannafelagið landsfund í Norðurlandahúsinum millum jól og nýggjár.

Tað eru í fyrsta lagi sóknarformenn FF's og teirra tiltaksmenn, sum møta á landsfundinum, og hvør sókn hevur eina atkvøðu.

Sjófólk og fiskimenn hava eisini høvi at vera við og hava talurætt á landsfundinum.

### Stívliga 100 fólk

Á síni heimasíðu eftir fundin, heldur Føroya Fiskimannafelag, at landsfundurin er besta høvi hjá fiskimonnum at kunna føra fram síni sjónarmið á røttum staði.

Á fundinum í ár vóru stívliga 100 fólk, bæði kend og nýggj andlit.

– Hetta var eitt fjølbroytt úrval av fiskimonnum úr øllum landinum, sum umboða ymisku veiðiháttirnar væl.

Tað var felagsformaðurin seinastu 36 árini, Óli Jacobsen, sum beyð vælkomin.

Vanligt er á landsfundi FF's at minnast trúgvar limir og álitismenn, um onkur er farin í árinum, sum fór – og soleiðis var eisini hesaferð.

Ein av sóknarformonnum felagsins gjøgnum mong ár, Petur Sofus Juul í Funningi, doyði síðsta summar.

### Drúgv frágreiðing

Halgir W. Poulsen, advokatur, varð settur at stýra fundinum.

FF hevur í nógv ár lagt fram sína ársfrágreiðing í bóklingi, og soleiðis var eisini hesaferð. Bóklingurin fyri farna ár fyllir heilar 140 síður, og í hesum vera tey mál viðgjørd, sum felagið hevur havt á skránni seinasta árið.

Bóklingurin verður sendur umborð á skipini, og teksturin verður eisini lagdur út á heimasíðu felagsins.

Eftir at felagsformaðurin hevur greitt frá farna ári, er orðaskifti, har fundarfólkið hevur høvi at taka øll viðkomandi mál upp.

### Tryggingarviðurskifti

Á landsfundinum greiddi Óli Jacobsen eitt nú frá um tryggingarviðurskifti hjá fiskimonnum.

Hann vísti á, at tað finnast altíð dømir, har hesi ikki rigga, sum tey eiga.

– Stóri trupulleikin er, at ein nýggj lóggáva á hesum øki hevur verið á veg í fleiri ár, men politiska viðgerðin er steðgað upp fleiri ferðir.

Óli helt, at tað má vera eitt krav, at henda lóggáva verður framd í hesi tingsetuni, soleiðis sum eisini verður lagt upp til.

Eitt annað sera aktuelt mál fyri fiskimenn er pensjónsmálið.

– Her hava vit eina skipan í sáttmálanum, har reiðarar og fiskimenn rinda hvør sína upphædd inn á eina eftirlønarkonto. Semja er um, at hetta einsamalt er ov lítið. Men spurningurin er eisini, hvussu lætt feløgini eiga at gera tað fyri politisku skipanina á hesum økinum. Jú meira feløgini gera á hesum øki, tess lættari sleppur politiska skipanini burtur úr trupulleikanum.

### Eykaískoyti

Á landsfundinum varð lagt fram eitt uppskot um, hvussu FF kann koma víðari á pensjónsøkinum.

– Ein møguleiki er, at umframt verandi sáttmálaásettu skipan, har upphæddirnar sjálvsagt skulu hækkast, verður gjørd ein eykaskipan. Hon kann vera tann, at tað verður ásett í sáttmálanum, at ein eykaupphædd verður tikin av partinum hjá fiskimonnum, sum skal fíggja eitt ískoyti til tær skipanir sum eru á økinum.

Undirtøka var á landsfundinum at arbeiða víðari við hesum spurningi.

Spurningurin um fiskimenn og ALS hevur leingi verið eitt afturvendandi mál, sum hevur verið trupult at loysa.

– Men hetta mál er aftur komið á tingborð, og tað skuldi merkt, at málið er tað nærri eini loysn, sigur Óli Jacobsen.

### Sáttmálaviðurskifti

Sambært heimasíðu felagsins, viðgjørdi landsfundurin eisini sáttmálaviðurskifti og onnur viðurskifti viðvíkjandi fiskimonnum.

– Tað er greitt, at her verða altíð mál at taka hond um, og tað er hugaligt, at menn nýta landsfundin júst til at reisa slík mál, sum felagsstjórnin so kann taka upp.

Atfinningar vóru í einstøkum málum, men sum heild heldur felagsformaðurin, sum helst førir pennin á heimasíðuni, at



*Eftir at felagsformaðurin, Óli Jacobsen, hevði lagt fram ársfrágreiðing felagsins fyri farna ár, var høvi at bera fram sína hugsan*

*Mynd: FF*